Kappingareftirlitið

Sókn Advokatar
Postsmoga 258
FO-110 Tórshavn

Att: Eyðbjørn Larsen, adv.

Tórshavn, tann 10. mai 2021

**Viðv. samanlegging av EFA og EHH**

Kappingareftirlitið fekk tann 19. apríl 2021 fráboðan um, at eftirlønargrunnarnir EFA og EHH høvdu ætlanir um at leggja saman. Fráboðanin var fullfíggjað 20. apríl 2021.

Talan er um eina samanlegging sambært §13, stk. 1, nr. 1 í kappingarlógini, og mørkini í §14, stk. 1. nr. 1 eru nádd. Samanleggingin skal tí fráboðast Kappingareftirlitinum sambært § 16, stk. 1 í kappingarlógini.

Fráboðað er eftir einfaldum leisti, tí treytin sambært § 3, stk. 1, nr. 3 í reglugerð nr. 2 frá 20. juli 2012 um fráboðan av samanleggingum, eru lokin.

Grunnarnir EFA og EHH reka eftirlønarvirksemi á føroyska marknaðinum, men einans limir í viðkomandi fakfeløgum kunnu spara upp í grunnunum. Støðan hesum viðvíkjandi verður óbroytt eftir samanleggingina.

Kappingareftirlitið hevur almannakunngjørt fráboðanina tann 21. apríl 2021 við freist til 29. apríl 2021 at koma við viðmerkingum til samanleggingina.

Við støði í teimum upplýsingum sum fráboðari er komin við, metir Kappingareftirlitið, at samanleggingin ikki gevur orsøk til ivasemi. Kappingareftirlitið hevur tí avgjørt at góðkenna yvirtøkuna eftir einfalda málsviðgerð, sbrt. § 15, stk. 5 í kappingarlógini.

Góðkenningin er givin treyta av, at tær upplýsingar sum luttakandi fyritøkurnar hava givið eru rættar, sbrt. § 18a, stk. 3 í kappingarlógini.

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
fulltrúi